FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Vegleiðing

## Tá tú søkir um avriksflutning á Fróðskaparsetri Føroya

Tú kanst søkja um avriksflutning fyri skeið, sum tú áður hevur lokið á hægri útbúgvingarstovni og eru sambærilig við skeið á útbúgvingini, sum tú tekur á Fróðskaparsetri Føroya. Um umsóknin um avriksflutning verður gingin á møti, verða viðkomandi skeið á útbúgvingini góðskrivað, og tú sleppur undan at taka tey.

Fyri at søkja um avriksflutning skalt tú vera innskrivað/ur sum lesandi á eini útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya.

Umsóknir, sum skulu verða liðugt viðgjørdar til komandi lestrarhálvu, skulu latast inn í seinasta lagi

- 15. september til várhálvuna
- 15. februar til heysthálvuna

Gevið gætur, at upprunapróvskjøl ella próvtalayvirlit yvir staðin skeið skulu vera váttað við undirskrift og stempli frá viðkomandi útbúgvingarstovni. Eisini skal øll skjalfesting, eitt nú skeiðslýsingar, latast inn í pdf-formati, og tað skal gerast greitt í telduposti, hvørji skjøl eru hjáløgd.

Tú hevur ábyrgd av, at umsóknin um avriksflutning er fullfíggjað og lýkur krøvini, sum eru lýst omanfyri og í reglugerðini um avriksflutning. Umsóknir, sum eru ófullfíggjaðar og t.d. vanta upplýsingar og/ella hjálagt tilfar, verða ikki viðgjørdar, fyrr enn tær eru nøktandi, og mugu sendast inn av nýggjum.

Útbúgvingarleiðari og viðkomandi fakfólk viðgera umsóknina og gera tilmæli at leggja fyri lestrarráðið á deildini til endaliga støðutakan.

Umsóknir um avriksflutning skulu latast Lestrarskrivstovuni á LSS@setur.fo og viðmerkjast skal "Umsókn um avriksflutning".

Um spurningar ella ivamál eru, kunnu fyrispurningar sendast til Lestrarskrivstovuna.

Vegleiðandi viðgerðar- og svartíð fyri umsóknir um avriksflutning er 2 mánaðir.

**GG:** Tey, sum søkja um upptøku á Fróðskaparsetri Føroya og ynskja at søkja um avriksflutning fyri eitt ella fleiri av teimum fyrstu skeiðunum á útbúgvingini, skulu útfylla umsóknarskjal um avriksflutning og leggja tað saman við umsókn um upptøku. Tá søkt verður um avriksflutning í sambandi við upptøku, er freistin tann sama sum fyri kvotu 2 umsóknir.